# Hundar kapp-aðust

Stór seyðahundakapping var við Leynavatn um vikuskiftið. Leygardagin kappaðust klassi 3, sum eru teir bestu hundarnir í landinum, og klassi 1, sum eru hundar á byrjunastøði. Sunnudagin kappaðust klassi 2, ið eru hundar, sum eru komnir víðari. Kappingin var væl fyriskipað og sera væleydnað. Í góðveðrinum luttóku 43 hundar.

Vinnarirnir gjørdust:



*Klassi 3:*
*Nr. 1 Páll Poulsen við Taru*
*Nr. 2 Eyðstein Jensen við Nap*
*Nr. 3 René Hansen við Taff*



*Klassi 2:*
*Nr. 1 Oyvindur Brimnes við Frigg*
*Nr. 2 Hjørleif H. Jensen við Holly*
*Nr. 3 Tummas jacobsen við Glen*



*Klassi 1:*
*Nr. 1 Tummas Jacobsen við Cap*
*Nr. 2 Eystein Jensen við Gyp*
*Nr. 3 Mikkjal Holm við Perlu*

Úrslit og fleiri myndir síggjast á heimasíðuni hjá Føroya Seyðahundafelag: www.hundar.fo

## Fyrilestur um blámusopp

Í kvøld kl 19.30 skipar Føroya Astma/Allergifelag fyri fyrilestri um trupulleikar við blámusoppi. Fyrilesturin verður í Miðlahúsinum í Havn. Lone Grønborg, lívfrøðingur, heldur fyrilesturin. Fyrilesturin fer at viðgera og umrøða evnini:

- Hvat er blámusoppur?
- Hvussu kemur blámusoppur inn?

Og um nýggj materialir í Føroyum, sum kann hjálpa einum til at verja seg við ímóti blámusoppi Fyrilesturin um blámusopp er almennur og øll áhugað eru vælkommin. Blámusoppur og inniluft eru evni, ið eru vorðin alt



## Eingin miðvika

Av serligum orsøkum verður eingin Miðvika í blaðnum mikudagin. Men mikudagin 6. apríl verður hon aftur sum vanligt við framhaldi av frásøgnini hjá Kristian Djurhuus, fyrrverandi løgmanni.

# Almenna má vísa ábyrgd

**VINNA Teir almennu byggiharrarnir mugu vísa ábyrgd, heldur Vinnuhúsið**

Eirikur Lindenskov

– Sum so nógvar aðrar vinnur er ráðgevara- og byggivinnan í Føroyum ávirkað av minkandi virkseminum sum heild. Tað almenna hevur eina ábyrgd sum byggiharri at tryggja, at torføra støðan ikki gerst enn verri við at seta hesum fyritøkum órímuligar ella óneyðugar treytir í teimum byggiverkætlanum, har tað almenna ella almennar fyritøkur eru byggiharrar, skrivar Vinnuhúsið í morgun.

Har halda tey, at tað vísir seg sum almennu byggiharrar sum heild hava valt at taka til sín somu treytir og mannagongdir, sum verða nýttar uttanlands.

– Hetta er teirra egna val, og eingin kann forða teimum í tí, hóast tú í summum førum ivast í, hvussu hóskandi hesar eru til føroysk viðurskifti, har fyritøkurnar eru smáar og oftast ikki líka kapitalsterkar sum útlendskar fyritøkur.

– Vit hava tó eisini sæð dømi um, at treytir og mannagongdir verða kopieraðar, sum eisini í størri samfeløgum uttanlands verða skírdar óneyðugar og órímuligar. Spurningurin er um almennu byggiharrarnir hava sett sjálvstýraran til, uttan at geva sær far um, hvussu lagda kósin ávirkar tær fyritøkur, sum virka her á landi.

Sum dømi um hetta – vísir Vinnuhúsið á – hava feløgini hjá donsku ráðgevaravinnuni (FRI og Danske Ark) nýliga sent Vága Floghavn eitt skriv, har tey vegna alla sínar limir (bæði føroyskar og danskar) átala tær treytir, sum verða settar í s.v. útboðið av ráðgevarauppgávunum til útbyggingarnar.

– Nú virksemið er minkandi og kappingin millum ráðgevara- og byggifyritøkur er beinhørð kann kanska tað verða freistandi í sambandi við útbjóðingar at seta fyritøkunum eyka treytir sum kunnu tykjast at geva byggiharranum nakrar marginalar fyrimunir, bara tí tað ber til.



Vinnuhúsið heldur, at almennu byggiharrarnir mugu tó ikki gloyma, at við øktum valdi kemur eisini økt ábyrgd.

– Og skuldu teir gloymt tað, mugu vit vóna, at vit hava nakrar vaknar politikarar, sum kunnu siga teimum, at tað er umráðandi at vit eisini í framtíðini hava so mikið av ráðgevara- og byggifyritøkum í Føroyum at vit framvegis hava eina virkna kapping. Um almennu byggiharrarnir nýta verandi keyparavald til at leggja fleiri óneyðugar byrðar yvir á ráðgevara- og byggivinnuna, sum hevur tað avleiðing, at tú missur ráðgevara- og byggivinnuna á gólvið, kann tað gerast almennu byggiharrunum og føroyska samfelagnum ein dýrur lærupeningur. Serliga tí at tað er púra óneyðugt. Nýggju treytirnar og mannagongdirnar geva hvørki betri ella bíligari byggjarí enn áðrenn. Heldur øvugt, heldur Vinnuhúsið.

# Fert tú á skeið fært tú starv

**FERÐAVINNA Nú er høvi hjá føroyingum at sleppa á ferðaleiðaraseið í Barcelona**

Magnus Gunnarsson

Í hesum døgum er Súsanna Gunnarsson frá skandinaviskafu ferðaleiðarafyritøkuni Service & Co í Føroyum og bjóðar øllum áhugaðum á ferðaleiðarskeið í Barcelona í Spania við garanti fyri at tey fáa starv sum ferðaleiðarar, tá skeiðið er liðugt.

Í hesum sambandi bjóðar føroyska ferðaskrivstovan Tora Tourist Traffic, sum umboðar Service & Co í Føroyum, ókeypis ferðseðil úr Føroyum til Kastrup og tur/retur. Hetta fyri at tað skal ikki kosta meira fyri føroyingar enn danir at koma á ferðaleiðaraskeiðið í Barcelona.

Ferðaleiðaraskúlin "Service og Co" upplærir ferðaleiðarnar til tey størstu og mest væl umtóktu ferðaliðini í øllum Skandanavia. Súsanna sigur, at sum føroyingur hevur tú sterk kort á hondum, tí føroyingar eru væl umtóktir, tá tey stóru ferðaliðini seta starvsfólk til at átaka sær umráðandi tænastuuppgávurnar úti á ferðastøðunum. Føroyingar eru m.a. væl umtóktir, tí teir duga væl tey skandanavisku málini, teir kunnu tosa við øll og skilja danskt, norskt og svenskt, og tað er ein fyrimunur hjá teimum stóru ferðaliðunum.

Service og Co. er tann einasti ferðaleiðaraskúlin sum "við garanti" kann bjóða arbeiði til allar teir góðkendu næmingarnar. Tað merkir, at um tú verður góðkendur, so kanst tú síggja fram til eitt spennandi arbeiði í útlandinum, sigur Súsanna Gunnarsson frá Service og Co. Skúlin er stórur og vælkendur. Fleiri enn 4.000 næmingar hava tikið prógv á skúlanum, síðan hann varð stovnaður í 1998.

Súsanna Gunnarsson er 27 ár gomul og fødd í Havn. Frá 1994 búði hon á Bømlo í Vesturnorra. Liðug við framhaldsskúlan var hon eitt skifti í USA og eitt skifti í Føroyum. Súsanna hevur, eins og fleiri aðrir føroyingar, gingið á ferðaleiðaraskúlanum hjá Service & Co., og síðan var hon eina sesong ferðaleiðari fyri charterfelagið Apollo á Kreta. Í dag býr Súsanna í Danmark. Hon hevur síðan 2007 arbeitt á skrivstovuni hjá Service & Co í Århus, og hevur hon tvey tey seinastu árini búð í Keypmannahavn, har hon arbeiðir bæði í checkin í Kastrup og í billettservice í Tivoli, umframt at hon heldur fyrilestrar fyri Service & Co.



*Súsanna Gunnarsson frá skandinavisku ferðaleiðarafyritøkuni Service & Co*

*Mynd: Jens Kristian Vang*